Álit

í

løgtingsmáli nr. 17/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Hækking av barnafrádráttinum – fylgilógaruppskot til FLU 2026)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 30. september 2025, og eftir 1. viðgerð 21. oktober 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 23. og 30. oktober 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Búskaparráðið og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Ingilín Didriksen Strøm, Dennis Holm, Hanna Jensen, Beinir Johannesen og Rósa Tyril Gaardlykke) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at hækka barnafrádráttin fyri hvørt barnið við ávikavist 1.500 kr. og 1.000 kr. Fyri børn undir skúlaaldur hækkar frádrátturin við 1.500 kr. og við 1.000 kr. fyri børn yvir skúlaaldur.

Barnafrádrátturin hjá landinum er í dag 9.200 kr. fyri børn í aldrinum 0-6 ár og 6.500 kr. fyri børn í aldrinum 7-17 ár.

Á leið 13.000 børn eru í Føroyum, harav 5.000 eru millum 0 og 6 ár og 8.000 eru millum 7 og 17 ár.

Uppskotið er ein partur av ætlanini hjá samgonguni at gera tað meir liviligt hjá barnafamiljum. Við hesum uppskotinum fær ein familja við trimum børnum millum 3.000 og 4.500 kr. meira útgoldið um árið.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Magnus Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Sambandsflokkurin er jaligur fyri, at barnafrádrátturin verður hækkaður, men tekur ikki undir við hesum uppskotinum. Orsøkin er, at Sambandsflokkurin hevur lagt fram uppskot (LM-044/2025) um at hækka barnafrádráttin við væl størri upphædd, enn uppskotið hjá samgonguni leggur upp til. Harafturat hevur Sambandsflokkurin eisini eitt annað boð uppá fígging av hækkingini av barnafrádráttinum (LM-045/2025), enn sitandi samgonga hevur.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 7. november 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Ingilín Didriksen Strøm
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Rósa Tyril Gaardlykke	